


Mynd: Polarcus

# Seismikkfelag er givið at gjalda rentur og avgjøld

Jógvan Hugo Gardar

07.12.2015 - 09:45

Oljan.fo

Reiðarí og feløg í frálandavinnuni berjast fyri at klára at koma ígjøgnum størstu kreppuna í vinnuni seinastu nógvu árini. Rokniskapartølini sum eru løgd fram í heyst vísa at hjá nógvum er fíggjarliga aldan øgiliga tung, og hjá fleiri er spurningurin um tey yvirliva um ikki oljuprísurin hækkar og meir virksemi verður sett í gongd.

Í morgun hevur seismikkfelagið Polarcus sent keypsskálanum boð um at virksemið hjá felagnum má endurskoðast, og at tey hava megna at minka um útreiðslurnar munandi.

Nú er felagið farið at samráðast við lángevararnar um eina langtíðar afturgjaldingarætlan. Sagt verður ikki nær ein slík ætlan kann vera klár, men støðan hjá felagnum er so mikið

álvarslig at Polarcus samstundis boðar frá at tey eru givin við at gjalda rentur og avdrøg uppá alla sína skuld.

Í fráboðanini til Oslo Børs stendur einki um hvussu stóra skuld sum fyritøkan ynskir at finna eina nýggja loysn fyri, men sambært E24 so vístu rokniskapartølini fyri triðja ársfjórðing at 68 milliónir dollarar vóru á bók, men skuldin var tá uppá knappar 600 milliónir dollarar.

Polarcus hevur sjey skip, harav eitt í løtuni liggur fyri teym.